UTTAN ÚR HEIMI

## Minni fuglur í Grønlandi

Amerikanskir granskarar, sum hava kannað nakrar fuglastovnar í Vesturgrønlandi, siga, at átta stovnar eru minkaðir nógv ta seinastu øldina. Eitt nú siga teir, at í dag eru umleið ein millión færri lomvigar í Vesturgrønlandi enn tíðliga í síðstu øld.

William Burnham, Kurt K. Burnham og Tom J. Cade hava talt fuglin og borið úrslitið saman við fuglateljingar, sum danski læknin Alfred Bertelsen gjørdi í Vesturgrønlandi í árunum frá 1905 til 1920. Teir siga, at í Uummannaq er lomvigin at kalla útruddaður, og at tað er nógv minni til av ritu, álku, æðu og falki nú enn tá. Orsøkina halda amerikonsku granskararnir vera, at tað er vorðið munandi trengri hjá fuglinum í Vesturgrønlandi ta seinastu øldina. Í hesum tíðarskeiðinum er fólkatalið ferfaldað, og í dag brúka menn skjóttgangandi bátar, tá teir veiða fugl.

Christian Hjorth, sum er formaður í danska fuglafelagnum, sigur við danska útvarpið, at gongdin við fuglinum í Vesturgrønlandi líkist einari lívfrøðiligari vanlukku.

## Vilja samstarva um olju

Russar vilja fegnir samstarva við norsku oljufeløgini, nú ætlanin er at fara undir oljuvinnu í Barentshavinum, og norsku feløgini fara neyvan at bera seg undan, skrivar Aftenposten.

Talan er serliga um Stockmanleiðina í russiska partinum av Barentshavinum. Leiðin er tann størsta gassleiðin, sum higartil er ávíst, og metingarnar siga, at hon er tríggjar ferðir størri enn Trollleiðin, sum er tann størsta gassleiðin á norska landgrunninum. Ein talsmaður hjá russiska gassfelagnum Gazprom sigur við Aftenposten, at norsku feløgini hava drúgvar royndir, og eftir hansara tykki er tað ikki annað enn rímiligt, at russar og norðmenn samstarva.

Tey bæði stóru norsku oljufeløgini, Statoil og Hydro, hava longu víst russiska hugskotinum áhuga. Statoil hevur boðið russum at taka lut í at menna Snøhvitleiðina, og Hydro hevur brúkt royndirnar á leiðini Ormen Lange til at sannføra russar um, at felagið er ført fyri at hjálpa Gazprom, tá russar ætlandi fara undir at menna Stockmanleiðina um nøkur ár.

## Sleppa útaftur

Í september í fjør dømdi ein spanskur dómstólur Najib Chaib Mohamed drúgva fongsulsrevsing fyri at hava verið limur í Al-Qaeda. Men seinasta fríggjadag kundi hann spáka út úr fongslinum sum frælsur maður, og teir næstu mánaðarnar sleppa fleiri av feløgum hansara eisini út úr fongslinum.

Orsøkin er, at dómurin ímóti monnunum er ikki galdandi enn. Teir dømdu hava skotið dómin inn fyri hægstarætt, men hann hevur ikki viðgjørt málini enn, og eftir spanskari lóg kunnu menninir sleppa leysir, til hægstirættur hevur tikið støðu. Tí slapp Najib Chaib Mohamed leysur í síðstu viku. Í næsta mánað sleppur Mohamed Zahar Adade leysur, í juli Jose Luis Gallant og í oktober Mohamed Ghaleb. Ein annar, Said Chedadi, slapp leysur longu í november í fjør.

Sponsku fjølmiðlarnir hava gjørt nógv burtur úr málinum og vísa á, at verandi lóg má broytast. Blaðið El Pais skrivar, at tað, sum nú hendir, minnir um tað, sum hendi í 2002. Tá varð algerski yvirgangsmaðurin Alekema Lamari latin leysur orsakað av somu lógargrein. Tvey ár seinni, tann 11. mars í 2004, skipaði hann fyri teirri blóðugu bumbuatsóknini í Madrid, sum kostaði 191 mannalív.

# Hamas til valdið



*Mahmoud Abbas, forseti, hevur sagt, at hann fer frá, um hann ikki sleppur at halda fram við friðarsamráðingunum við Ísrael*
*Mynd: Reuters*

**Hóast almenna valúrslitið ikki er almannakunngjørt enn, bendir alt á, at Hamas vann palestinska tjóðartingsvalið og skal skipa eina stjórn, sum umheimurin ikki vil kennast við**

VAL
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Langt áðrenn uppteljingin var liðug, kunngjørdi leiðslan í Hamas, at flokkurin hevði vunnið valið, tí hann hevði fingið í hvussu er 70 av teimum 132 tinglimunum og sostatt meiriluta.

Løtu seinni ásannaðu leiðandi limir í Fatah-stjórnarflokkinum, at flokkurin hevði tapt, og Ahmed Qurie, forsætisráðharri, kunngjørdi, at hann og hansara ráðharrar høvdu lagt frá sær.

– Fólkið hevur valt, og vit mugu virða fólksins avgerð. Er úrslitið tað, sum sagt verður, eigur forsetin at biðja Hamas skipa stjórn, segði forsætisráðharrin, tá hann boðaði frá, at stjórnin var farin frá. Sambært tíðindastovunum misti Fatahflokkurin serliga nógvar atkvøður á bygd.

Sambært stýrisskipanini skal Mahmoud Abbas, forseti, biðja tann størsta flokkin skipa stjórn. Sjálvur er forsetin valdur beinleiðis, so úrslitið av tjóðartingsvalinum hevur onga ávirkan á embætti hansara, men Abbas hevur sagt, at hann fer at leggja frá sær, um valúrslitið ber í sær, at friðarsamráðingarnar við Ísrael steðga upp.

Enn er heldur ikki nakað, sum bendir á, at nakrar samráðingar verða við Ísrael. Ein talsmaður hjá Hamas sigur við AP, at sum er kemur tað ikki upp á tal at viðurkenna Ísrael.

– Samráðingar við Ísrael standa ikki í politisku skrá okkara, sigur Mushir al-Masri, sum sjálvur er valdur í nýggja tjóðartingið. Hann heldur kortini, at Hamas eigur at leggja seg eftir at fáa samstarv við Fatah-flokkin, tí tað er umráðandi, at tað palestinska fólkið stendur saman, sigur hann.

### Skal leggja vápnini

Tað góða valúrslitið hjá Hamas kemur Ísrael og USA sera illa við, og bæði londini hava gjørt greitt, at tey fara ikki at samráðast við eina Hamas-stjórn, fyrr enn Hamas broytir politikk og stevnumið.

– Ísrael kann als ikki góðtaka, at Hamas verður partur av einari palestinskari stjórn. Hamas er ein yvirgangsfelagsskapur, sum hevur sum mál at beina fyri Ísrael, og tí er tað okkara krav, at felagsskapurin letur vápnini frá sær, sigur ísraelski forsætisráðharrin, Ehud Olmert.

Hann fekk alt fyri eitt fullan stuðul frá amerikanska forsetanum, George W. Bush.

– Vit tingast ikki við teir, fyrr enn teir sleppa tankanum um at oyðileggja Ísrael, vóru boðini úr Hvítu Húsunum.

ST-aðalskrivarin, Kofi Annan, vil eisini hava Hamas at lata vápnini frá sær.

– Ein og hvør vápnaður felagsskapur, sum vil sleppa at taka lut í einari demokratiskari tilgongd, eigur at lata vápnini frá sær, tí tað er ikki sambæriligt at bera vápn og at sita í lóggevandi tinginum. Eg ivist ikki í, at Hamas skilir tað, sigur Kofi Annan.

# Skiparanir koyrdir í land

**Tveir skiparar hjá Color Line hava fingið sekkin, tí manningin slapp at drekka**

Nýggjársaftan loyvdu skipararnir á ferjunum "Kronprins Harald" og "Color Fantasy" manningunum at smakka sær á, meðan skipini lógu við bryggju í ávikavist Oslo og Kiel.

Men tað gongur ikki, sigur reiðaríið. Tí vórðu báðir skipararnir boðsendir fyri einari viku síðani. Tað er ikki greitt, hvat bleiv sagt á fundinum, men í hvussu er eru teir ikki skiparar hjá Color Line longur, skrivar Aftenposten.

Kunningarstjórin hjá reiðaríinum, Helge Otto Mathisen, sigur við blaðið, at manningarnar hava als ikki loyvi at drekka nakað sterkt, sama um skipini liggja við bryggju ella ikki.